

## Grand Prixið gott fyri bólkin

Cheif 1 heldur, at The Dreams longu hevur fingið tað burtur úr Grand Prixnum, sum ætlanin var. – Vit vildu vera tað skeiva innslagið í Grand Prixnum og vísa The Dreams fram, og tað hava vit gjørt. Sangirnir á teirra myspace-síðu hava verið spældir 10.000 ferðir, og tað sama er við teirra framførslu frá Grand Prixnum, sum liggur á YouTube. Og tað er sjálvandi eyka hugaligt, at vit komu í finaluna í Grand Prixnum, og nú kunnu vit vísa enn fleiri fólki, hvat The Dreams eru, sigur Chief 1.
Mynd: Polfoto

# Høvdingin hjá The Dreams



**– Eg valdi at samstarva við The Dreams, tí teir eru fantastiskir. Teir eru nakrir av teimum fittastu fólkunum, sum eg nakrantíð havi hitt, og teir eru serstakliga seriøsir. Teir venja sera miðvíst og ganga so høgt upp í tónleikin, at eg havi ikki upplivað nakað líknandi millum teir tónleikarnar, sum eg havi annars havi arbeitt saman við seinnu árini, sigur danski tónleikaframleiðarin Chief 1.**

## Samrøða



**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Chief 1 er kendur og royndur tónleikaframleiðari í Danmark. Lars Pedesen, sum hann annars eitur, hevur sjálvur eina fortíð sum ein av limunum í bólkinum Rockers By Choice, men nógvu seinnu árini hevur hann fingist við at skriva og framleiða tónleik saman við øðrum bólkum og sangarum.

Tað nýggjasta er, at Chief 1 er farin at samstarva við føroyska rockbólkin The Dreams, og hann hevur veruliga sett ferð á bólkin, sum er komin við í finaluna í Grand Prixnum og gevur fløgu út í Danmark um tvær vikur.

- Eg havi gjørt tónleik meginpartin av mínum lívi. Eg livi av og fyri at gera tónleik, og eg leiti altíð ímóti tí, sum eg haldi verða spennandi. Fyri einum ári síðani var eg til eina tónleikakapping í Vega í Keypmannahavn, og tá hoyrdi eg fyrstu ferð The Dreams. Eg lurtaði eftir 23 bólkum tað kvøldið, men tað var bara ein bólkur, sum eg fekk meg á føtur og fram til pallin, og tað var The Dreams. Tá ið eg hoyrdi teir, hugsaði eg: Hvat tramin hendir her?

- Hetta var ein av teimum løtunum, sum eg livi fyri í tónleiki. Løturnar upplivir tú ikki so ofta, men tá ið eg geri tað, so eg eri glaður fyri, at eg ikki eri húsaseljari ella okkurt annað, men framvegis fáist við tónleik, sigur Chief 1.

### Føroyingar eru eyðmjúkir

Chief 1 sigur, at tað hevur verið sera hugaligt at arbeitt saman við The Dreams.

- Eg valdi at samstarva við The Dreams, tí teir eru fantastiskir. Teir eru nakrir av teimum fittastu fólkunum, sum eg nakrantíð havi hitt, og teir eru serstakliga seriøsir. Teir venja sera miðvíst og ganga so høgt upp í tónleikin, at eg havi ikki upplivað nakað líknandi millum teir tónleikarnar, sum eg havi annars havi arbeitt saman við seinnu árini, sigur Chief 1.

- Tað sigi eg ikki bara fyri at smikra fyri føroyingum. Fyri mína skuld kundu The Dreams líka væl komið úr Belgia ella Íslandi, men teir eru bara sera dugnaligir, skriva feita sangir, og eru sera góðir at samstarva við.

- Eg taki mær ikki heiðurin fyri at hava uppfunnið The Dreams. Teir hava spælt í fleiri ár, og eg havi bara verið so heppin at møta teimum og fáa møguleikan at arbeiða saman við teimum.

### Teir baktala meg

Er tað øðrvísi at arbeiða saman við føroyskum tónleikarum samanborið við teir donsku?

- Eg arbeiddi eisini eitt sindur saman við Guðrun Sólju, eftir at hon hevði vunnið Stjerne for en aften, og skal eg finna ein felagsnevnara fyri teir føroysku tónleikararnar, so er tað kanska, at teir eru sera eyðmjúkir. Føroyskir tónleikarar bresta ikki inn gjøgnum hurðina og rópa: Her eru vit, vit eru rockstjørnur. Tað gera teir ikki fyrr enn teir hava fingið eitt sindur at drekka.

- Eg haldi, at føroyskir tónleikarar eru sera seriøsir við tónleikinum. Hóast vi onkuntíð arbeiða til seint um kvøldið, so eru teir klárir morgunin eftir, hóast tað kann verða tungt at koma upp um morgunin. Og so standa teir har, teir hava fyrireikað seg, duga síni ting og brenna fyri tónleikinum.

Chief 1 heldur, at samstarvið við The Dreams eisini hevur latið eyguni hjá honum upp fyri tí fremmanda.

- Nú skilji eg eitt sindur betur, hvussu tað er at liva í einum fremmandum landi, har tú ikki